

John Johannessen er nývaldur á Føroya Løgting. Á myndini fær 26 ára gamli javnaðarmaðurin at vita, at hann er valdur á ting
Mynd: Jens K. Vang

# Kennist øgiliga væl

**Nýggi tinglimur Javnaðarfloksins í Suðurstreymi, John Johannessen, er sum vera man fegin um góða úrslitið. Hann sigur seg vilja arbeiða fyri, at umhvørvismál og gerandisdagurin hjá fólki í størri mun koma á politisku dagskránna í Føroyum**

NÝGGJUR TINGMAÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hann hevði fingið heitið sum jokarin hjá Javnaðarflokkinum á hesum løgtingsvalinum. Sjálvur hevur høvuðspersónurin ikki dult fyri, at hann tók ein stóran váða, tá hann gjørdist valevni og harvið mátti leggja starvið sum tíðindamaður frá sær.

Vit tosa sjálvsagt um 26 ára gamla John Johannessen, sum við 380 persónligum atkvøðum endaði á øðrum plássi á javnaðarlistanum í Suðurstreymi.

## Væl stuðlaður

– Hetta kennist øgiliga væl. Eg eri ótrúliga takksamur fyri, at so nógv fólk hava sýnt mær álit. Tey, ið heittu á meg um at stilla upp, hava verið ótrúliga hjálpsom og arbeitt hart fyri hesum og eg kann ikki annað enn vera takksamur, sigur nýggi tingmaðurin úr Javnaðarflokkinum, John Johannessen.

Spurdur, um hann hevði væntað at komið á ting, svarar John Johannessen, at hann snøgt sagt ikki visti, hvussu úrslitið fór at laga seg. Seinastu vikuna hevur John ligið sjúkur og tað hevur avmarkað hansara leiklut í valstríðnum nakað.

– Eg átti av røttum ikki at hildið røðuna í Norðurlandahúsinum sunnukvøldið, men tað gekk kortini og eg má bara enn einaferð siga, at eg eri ótrúliga glaður fyri stuðulin, greiðir John Johannessen frá

## Umhvørvið

Undir valstríðnum hevur John Johannessen verið íðin við blaðskriving, har hann hevur gjørt greitt, hvørji mál hann ætlar at virka fyri. Ætlaninar hava verið breiðar og mangar, og tí spyrja vit hann, um tað er nøkur øki sum liggja honum nærri enn onnur.

John er skjótur at svara, at umhvørvismál eiga í størri mun at koma á politisku dagsskránna aftur. Hann er heitur talsmaður fyri, at tað í framtíðini verður politiski myndugleikin og ikki SEV sum orðar føroyska orkupolitikkin.

– Eg haldi eisini tað er ómetaliga týdingarmikið, at gerandisdagurin aftur kemur til fólki. Her hugsi eg serliga um íbúðarviðurskiftini, sum eftir mínum tykki skulu betrast, sigur nýggi tinglimur Javnaðarfloksins.

John vil einki siga um, hvør samgongumøguleiki er fremst í huganum hjá sær, men hann slær fast, at nú skal Javnaðarflokkurin aftur í samgongu, eftir at hava sitið uttanfyri, síðan 1996.








*Ein uppgerð er væntandi í Sambandsflokkinum. Stór ónøgd er í flokkinum við úrslitið, og næstformaðurin staðfestir, at formaðurin kláraði seg illa í sjónvarpinum*

# Uppgerð væntandi í Sambandsflokkinum

**Næstformaður Sambandsfloksins, Alfred Olsen av Saltnesi, finst at formanni floksins fyri vánaliga valstríðið, sum hon hevur ført. Lisbeth L. Petersen vísir hinvegin á, at flokkurin gekk aftur allastaðni, og at formaðurin ikki einsamøll kann hava ábyrgdina av tí**

LØGTINGSVALIÐ
*Stefan í Skorini*

Mikudagin klokkan 15 hevði tingmanning Sambandsfloksins fund, nú løgtingsvalið er farið afturum bak. Talan er um eina eftirmeting av úrslitinum, og tað vánaliga valið, sum flokkurin hevði.

Øll væntaðu jú ein stórsigur til Sambandsflokkin, men hóast flokkurin fekk flestar atkvøður, má staðfestast, at flokkurin dragnaði nógv í valstríðnum.

– Formaðurin hevði eitt vánaligt val í sínum valdømi, og tað hevur ikki gingið væl hjá henni í valstríðnum í sjónvarpinum, sigur Alfred Olsen, sum slær fast, at valið als ikki er nøktandi fyri flokkin eftir teir sera bjørtu spádómarnar fyri nøkrum vikum síðani.

Næstformaðurin vil tó ikki gera nakrar viðmerkingar til, um nýggjur formaður skal finnast áðrenn landsfundin í mars. Hann avsannar tó, at hann er ein av teimum, sum hevur "spískað albogarnar", sum Dimmalætting skrivaði undan valinum.

## Kann ikki lastast einsamøll

Tað sást á øllum brøgdum, at Lisbeth L. Petersen var sera vónbrotin eftir valið týskvøldið. Hon hevði stóra persónliga afturgongd og fór úr 1394 atkvøðum niður í 648.

– Flokkurin gekk aftur allastaðni, og tað kann ikki vera formaðurin, sum fær alla ábyrgdina av úrslitinum, sigur Lisbeth L. Petersen.

Um útsagnirnar hjá næstformanninum sigur Lisbeth L. Petersen, at hann óivað sipar til teir etisku og moralsku spurningarnar, sum vóru umrøddir í sjónvarpinum.

Har varð hon millum annað spurd um skrásett parlag fyri samkynd, og hon ásannar, at hon ikki hevði serliga greiðar útmeldingar á hesum økinum.

Lisbeth L. Petersen vil annars ikki gera nakrar stórvegis viðmerkingar til gitingarnar um formanspostin. Hon sigur, at fyrst skal flokkurin viðgera støðuna innanhýsis, og so skal landsfundurin tala í mars.

Sambandsflokkurin sum flokkur stuðlar annars ikki lógini um skrásett parlag, so at samkynd kunnu liva saman í skrásettum parlagi.

## Órættvís vallóg

Sambandsflokkurin fekk annars flest atkvøður, men Tjóðveldisflokkurin við triðflest atkvøðum gjørdist størsti flokkur á tingi.

– Vallógin má broytast. Eitt sindur av rættvísi má vera í býtinum av tingmonnum, sigur Lisbeth L. Petersen, nú tað gjørdist greitt, at flokkurin ikki fekk flest tinglimir, hóast flokkurin fekk flest atkvøður.